# Grundarsteinur: Gransking, menning og nýskapan

## Aðalmál

**Viðvíkjandi gransking, menning og nýskapan eru Føroyar millum fremstu lond í heiminum. Í sambandi við at granska matframleiðslu úr havinum eru vit á odda. Viðurskiftini millum tað almenna og vinnuna eru samskipað við atliti at raðfestingum. Karmarnir tryggja, at gransking, menning og nýskapan fáa bestu kor at virka undir. Fíggjarliga tilfeingið er stigvíst økt, og í 2015 er tað í minsta lagi 3% av bruttotjóðarúrtøkuni.**

## Samandráttur

Føroyar eru og skula framhaldandi vera eitt gott land at búgva í. Alheimsgerðin ger at heimurin verður 'minni', og hevur tað nýggjar møguleikar við sær. Fyri at menna Føroyar og fyri at varðveita okkara unga vælútbúna fólk her á landi, skula vit fegnast um, vera opin fyri og troyta teir nógvu møguleikar, sum alheimsgerðin gevur – møguleikar fyri at økja um vælferðina og møguleikar fyri at bjóða fólki okkara betri arbeiði.

Vitan og nýhugsan eru lykilin til at troyta teir nógvu møguleikar, sum alheimsgerðin gevur. Tí skula vit seta okkum sum mál at hava útbúgvingar í heimsflokki og at vera á odda alheimsliga á útvaldum granskingarøkjum.

Vit hava soleiðis bestu kor, sum hugsast kunnu, til at menna okkara land: alheimsgerðin við nógvum nýggjum møguleikum og eitt vælútbúgvið fólk merkt av nýhugsan og virkisfýsni til at troyta hesar møguleikar. Gransking við tilhoyrandi hægri útbúgvingum skal skapa haldgóða menning og nýskapan og skal vera við til at varðveita Føroyar sum eitt gott land at búgva í. Granskingin verður skipað soleiðis, at hon verður so áhugaverd, at hon dregur til sín fremstu granskarar.

Føroyar skulu í 2015 nýta í minsta lagi 3% av BTÚ til gransking og menning eins og onnur framkomin lond. Gransking og menning skulu skipast í *ein* bygnað, soleiðis at vit fáa skapað eitt dynamiskt, livandi og kveikjandi granskingarumhvørvi við eini sterkari fyrisiting, sum kann veita granskarum (og undirvísarum) neyðugu ráðgeving og leiðbeining.

Í sambandi við at granska matframleiðslu úr havinum skulu Føroyar gerast fremstar í heiminum. Onnur granskingarøki, sum skula raðfestast høgt, eru: gentøkni, mentan og KST.

Fyri at seta ferð á føroysku granskingina verða serligar skatta- og stuðulsskipanir gjørdar tey fyrstu árini fyri vælskikkaðar útlendskar granskarar, sum skula vera við til at gera Føroyar sjónligar sum granskingarøki.

# Partmál

Fyri gransking, menning og nýskapan hevur strategibólkurin orðað partmál um:

- Bygnað
- Frammarlaga raðfest øki
- Fígging og úrtøku

## Bygnaður

**Øll gransking og hægri útbúgving er skipað í ein bygnað. Bygnaðurin gevur granskarum eitt kveikjandi og dynamiskt umhvørvi og hevur støðugar, dygdargóðar og tryggar fyrisitingarligar, starvsligar og fysiskar karmar.**

## Soleiðis røkka vit málinum

Skipaður verður *ein* bygnaður (organisatión), sum tryggjar starvsligar og fysiskar karmar fyri granskarar o.o. Partur av hesum bygnaði fevnir eisini um hægri útbúgving. Bygnaðurin fevnir um tann organisatoriska partin, t.e. at øll viðurskifti viðvíkjandi gransking fara fram her, eitt nú fyrisiting, roknskapur, løgfrøði, starvslig viðurskifti o.a.

Nýggi bygnaðurin (organisatiónin) skal tryggja skapandi/mennandi umhvørvi og góðar umstøður hjá øllum granskarum at virka undir, umframt at knýta sambond við vinnuna o.o.

Fyri at menna eitt sterkt granskingarumhvørvi og fyri at gagnnýta stórrakstrarfyrimunirnar skal granskingin savnast í eitt frøðiliga sterkt umhvørvi við eini góðari granskingarleiðslu. Tey bestu úrslitini fáast í granskingarbólkum. Umráðandi er eisini, at umhvørvið er merkt av altjóða luttøku.

Eisini er umráðandi, at undirstøðukervið (t.e. høli, tól, dátugrunnar, bókasøvn o.a.) innan gransking er gott.

Nýggja skipanin leggur upp til, at granskarar, sum eru knýttir at einum almennum stovni ella privatum virki, sjálvir kunnu gera av, um teir vilja halda fram á stovninum/í virkinum, ella um teir vilja vera partur av nýggja umhvørvinum.

Hægri lærustovnar fáa eitt hóskandi tal av ph.d.-námsstyrkum á hvørjum ári fyri at tryggja, at nóg stór tilgongd verður av nýggjum fólki og at frøðiliga menningin verður nóg dygg. Vinnuligar ph.d.-verkætlanir og aðrar vinnuligar verkætlanir kunna fáa almennan stuðul. Dugnalig gransking krevur serligar granskingarútbúgvingar, sum t.d. ph.d. og postdoc., og harumframt eru talentrøkt og fokus á granskingarleið týðandi fortreytir fyri menning av góðum granskingarumhvørvi.

Granskingin verður fíggjað við grundfígging, sum fevnir um tær rakstrarligu uppgávurnar, og annars gjøgnum granskingargrunnin og vinnuliga fígging. Útbúgvingarnar verða fyri ein stóran part fíggjaðar við játtan á løgtingsfíggjarlógini og fyri ein minni part við peningi úr granskingargrunninum til serligar granskingarverkætlanir.

## Góðir karmar fyri gransking, menning og nýskapan hjá vinnuni

Fleiri fólk við hægri útbúgvingum skulu vera við til at styrkja gransking, menning og nýskapan í vinnuni. Gott samstarv verður millum granskingarstovnar og vinnuna. Vinnan skal hava góðar møguleikar fyri at taka lut í alment fíggjaðari gransking, herímillum eisini granskingarskráum hjá ES og aðrari altjóða gransking.

Nýskapan kann fremjast gjøgnum samstarv millum vinnu og vísindafólk á virkjum, granskingarstovnum og hægri lærustovnum í Føroyum og uttanlands.

Hægri lærustovnar skulu í teirra menningarætlanum seta sær mál viðvíkjandi at skipa styttri granskingargrundaðar eftirútbúgvingar til vinnuna.




**Vísindaráðið:** Størsta uppgávan hjá vísindaráðnum er at tilluta granskingini myndugleika, tyngd, tign og tilfeingi. Vísindaráðið orðar yvirskipaða granskingarpolitikkin við eini felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan. Vísindaráðið heldur fram í tí líki, sum tað er í dag við løgmanni sum formanni, landsstýrismanninum í granskingarmálum sum næstformanni, landsstýrismonnunum í ávikavist vinnumálum, innlendismálum, fíggjarmálum, fiskivinnumálum og heilsumálum sum umboðum, og harumframt við

umboðum fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag, løntakarafeløgini, Fróðskaparsetrið og sektorgranskingarstovnarnar.

**Stýrið:** Bygnaðurin innan fyri brotastrikurnar verður skipaður sum ein sjálvsognarstovnur við viðtøkum, har reglur og karmar eru ásett. Evsti myndugleikin er stýrið, ið hevur ábyrgdina av virkseminum í síni heild. Stýrið er sett saman við fólki, ið hevur førleika eftir teimum uppgávum, sum tað skal útinna og setur og loysir úr starvi stjóran, sum verður áramálssettur.

Stýrið hevur ábyrgd av at gera langtíðarætlanir við støði í teimum uppgávum og endamálum, sum eru ásett fyri stovnin. Stýrið er eisini 'policy-skapandi' og skal viðgera øll mál av størri týdningi.

Stýrið umsitur granskingargrunnin og tekur endaliga støðu til, hvørjar umsóknir verða stuðlaðar, tá ið tær eru vísindaliga mettar.

**Granskingargrunnurin:** fær árliga játtan á løgtingsfíggjarlógini. Granskingargrunnurin stuðlar gransking, ið lýkur hægstu altjóða krøv. Játtanin kann flytast millum ár, og stuðulin kann gjaldast út soleiðis, sum er best hóskandi fyri viðkomandi granskingarverkætlan.

**Stjórin:** hevur yvirskipaðu ábyrgdina mótvegis stýrinum. Stjórin skal tryggja, at økini gransking og hægri útbúgving verða fyrisitin og útint samsvarandi teimum mannagongdum og ásetingum, sum stýrið hevur stungið út í kortið. Stjórin setur og loysir úr starvi rektaran fyri lærda háskúlan og leiðaran fyri granskingarlundina, sum báðir verða áramálssettir.

Stjórin skal ráðgeva stýrinum í granskingar- og útbúgvingarpolitiskum spurningum. Stjórin skal fylgja við menningini í føroyskari og millumtjóða gransking – og gera kanningar og uppskot undan støðutakan stýrisins. Stjórin skal ráðgeva í spurningum um, hvussu granskingin kann gerast gagnlig fyri samfelagið – bæði á almenna og privata økinum. Hann skal ráðgeva í sambandi við fyrireiking og skipan av granskingarlóggávu, skal taka stig til uppskot um, hvussu tíðarbærir granskingarpolitiskar spurningar og evni skulu loysast, skal ráðgeva í sambandi við gagnnýtslu av granskingarúrslitum og útbúgving av granskarum og skal ráðgeva og vera stýrinum til hjálpar í arbeiðinum at orða langtíðarætlanir. Stjórin er skrivari hjá stýrinum.

**Fyrisitingin:** samskipar fyrisitingarliga, fíggjarliga og løgfrøðiliga arbeiðið í allari skipanini. Eisini hevur fyrisitingin til uppgávu at vera granskarum til hjálpar í teirra fyrisitingarligu uppgávum, so teir kunnu leggja alla sína orku í granskingina. Fyrisitingin skal leiðbeina og ráðgeva granskarum í granskingarspurningum.

**Lærdi háskúlin** er universitetið í Føroyum, og á lærda háskúlanum eru allar tær akademisku útbúgvingarnar (sum altíð eru granskingargrundaðar) í Føroyum staðsettar. Tað merkir, at allar útbúgvingar, sum eru á bachelor-stigi ella hægri, verða savnaðar har.

**Rektarin fyri lærda háskúlan**: hevur ábyrgdina av lærda háskúlanum mótvegis stjóranum og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni.

**Granskingarlundin** er ein bygningur, ið skal kunna rúma øllum granskingarvirksemi. Granskingarlundin skal hava eitt virkið granskingarumhvørvi og eitt netverk, sum dregur til sín vitan. Granskingarlundin skal virka sum kveikjari fyri allari gransking. Leiðarin fyri granskingarlundina hevur ábyrgdina av granskingarlundini mótvegis stjóranum og hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni.

**Sektorgranskingarstovnarnir:** kunnu fremja sína gransking í samstarvi við nýggja bygnaðin. (Ein sektorgranskingarstovnur er ein almennur stovnur, sum granskar, miðlar vitan, ráðgevur og hevur myndugleikauppgávur í sambandi við eitt ávíst samfelagsøki).

**Vinnan:** fremur sína gransking í samstarvi við ta gransking, sum fer fram í nýggja bygnaðinum.

**Onnur gransking:** verður í størst møguligan mun løgd inn í nýggja bygnaðin. Har hetta ikki letur seg gera ella ikki er hóskandi, skal eitt so neyvt samstarv sum møguligt vera við ta gransking og útbúgving, sum fer fram í nýggja bygnaðinum.

## Frammarlaga raðfest øki

**Granskingarøki, sum eru týðandi fyri samfelagið, og sum serligar góðar fortreytir eru fyri í føroyska samfelagnum, eru raðfest soleiðis, at dygdin og úrslitini verða í fremstu røð.**

## Soleiðis røkka vit málinum

Til tess at verða fremst og nýta tilfeingið á skilabestan hátt, er neyðugt at raðfesta ávís granskingarøki. Grundgranskingin verður fyrst og fremst tryggjað við árligum játtanum á løgtingsfíggjarlógini beinleiðis til lærda háskúlan og til sektorgranskingarstovnarnar. Í ein ávísan mun kann fígging til grundgransking eisini verða veitt granskingarlundini.

Raðfesta granskingin tekur støði í økjum, har vit hava serligar fyrimunir og drúgvar royndir. Hetta útihýsir tó ikki, at onnur øki enn tey raðfestu kunnu verða granskað.

Vitanarframleiðsla er grundleggjandi og neyðug fyri eitt burðardygt samfelag, og hon skal frameftir eggja og menna granskingarspírar í útbúgvingarskipanini. Farið verður miðvíst inn í raðfestu granskingarøkini fyri síðani at menna nýggj øki, soleiðis at samfelagið frameftir fær fleiri bein at standa á.

Høgt raðfestu økini skulu vera við til at lyfta raðfesta partin av granskingini upp á altjóða stig, samstundis sum onnur natúrlig fylgiøki fáa fyrimun av hesum. Fremst raðfesta økið er matframleiðsla úr havinum, og onnur frammarlaga raðfest øki eru gentøkni, mentan og samskiftisførleiki. Onnur viðkomandi granskingarøki, sum stuðla undir hægri vælferð og trivnað, verða eisini stuðlað, treytað av, at tey eru viðkomandi.

Tann peningur, sum verður settur av til gransking, menning og nýskapan komandi árini, skal verða nýttur soleiðis, at Føroyar fáa gagnnýtt fyrimunir sínar á raðfestu granskingarøkjunum. Endamálið er, at føroysk gransking kemur í fremstu røð. Á henda hátt verða fortreytir hjá vælútbúnum føroyingum og vælútbúnum fólkum úr øllum heiminum at liva og virka í Føroyum.

**Matframleiðsla úr havinum:** Matvøruvinnan skal stíga fram sum ein marknaðartillagað, umhvørvisgóð og lønandi vinna. Ein vinna, sum miðvíst troytir tað tilfeingi, sum er tøkt í samfelagnum við aliti at rávøru, tøkni, dygd og førleika.

Fyri at røkka hesum máli er umráðandi at menna granskingarumhvørvið við vísindaligum førleika á altjóða stigi. Frøðiøkini eru fleiri: náttúrufrøði, búskaparfrøði, marknaðar- og tilfeingisrøkt.

Framleiðsla av góðum, tryggum, føðsluríkum mati krevur samstarv og heildarhugsan í øllum liðum í virðisketuni av grunni í munn.

Skynsom og burðardygg umsiting, gagnnýtsla og virðisøking av náttúrutilfeinginum er treytað av hollari vitan um náttúruna og tey viðurskifti, ið ávirka hana. Gransking er amboðið at fáa hesa vitan til vegar, og avbjóðingarnar eru nógvar og fjøltáttaðar.

Tilfeingið í sjónum skal troytast burðardygt. Fiskastovnarnir í føroyskum sjógvi og alifiskur eru týdningarmiklir partar av grundarlagnum undir vinnuliga virkseminum og útflutninginum.

Í heimshøvunum eru havleiðirnar um Føroyar fjølbroyttar. Havstreymarnir hava stóran týdning fyri lívið í sjónum kring Føroyar og fyri veðurlagið kring allan knøttin.

Nýskapan gevur førleika at nýta tilfeingið til at skapa nýggjar vinnur og fáa størri virðisøking í sambandi við framleiðslu og útflutning. Føroyar kunnu gerast ein áhugaverd royndarstova fyri nýskapandi tiltøkum.

Fyri at fáa framgongd í vinnuni krevst førleiki at menna og laga tøkni og framleiðsluhættir til. Serligar avbjóðingar liggja á vitanartungum økjum. Ein avgerandi fortreyt er eitt vælvirkandi KT-undirstøðukervi.

**Mentan:** Holl vitan um mentaarvin er ein fyritreyt fyri tilvitaðari samfelagsmenning. Mentaarvurin er granskingarevni í hugvísindum.

At rannsaka mentaarvin vísindaliga fevnir um samstarv og samskifti við rørslur og rák í altjóða samfelagnum.

Í Føroyum hava tjóðskaparligu eyðkennini verið orðað gjøgnum mentanina. Undirvísing á øllum stigum er týðandi táttur í mentanarligu miðlingini, eins og trúarlívið setur dám á mentanina.

Hugvísindalig gransking er sjálvsøgd í eini tíð, tá ið ímyndingarevni og hugaheimur fáa alt størri týdning í vinnuligum høpi.

Kunnleikan til føroyska málið skal mennast við støði í støðugum kanningum og viðgerð, og granskað verður, hvussu tað ber til, at føroyskt finst og mennist. Málið broytist alla tíðina. Tí er neyðugt, at tað altíð verða gjørdar málfrøðiligar rannsóknir av samtíðarmáli og søguligum máli, at bókmentirnar verða viðgjørdar sum listarlig málnýtsla og boðberar um lívs- og heimsfatan. Harafturat mugu mál og bókmentir síggjast í søguligum og samfelagsligum høpi. Nýggj tøkni eigur at verða skapað og ment til at føroyska málið framvegis kann verða nýtt í gerandis-, yrkis- og vísindahøpi.

**Gentøkni:** Arvaeginleikar verða sum heild granskaðir, bæði hjá fólki og fiski. Við tað at Føroyar hava ligið avbyrgdar og fjarskotnar, er arvfeingi føroyinga rættiliga líkt. Hetta hevur við sær fyrimunir, tá ið roynt verður at staðfesta, hvar á arvastronginum ávísar sjúkur hava

sín møguliga uppruna. Harumframt er heilsuverkið í Føroyum so framkomið, at flestar sjúkur eru væl skrásettar, og í kirkjubókum ber til at síggja ættartræ føroyinga langt aftur í tíðina. Við hesum eru fortreytirnar til at gera arvagransking í serligan mun til staðar í Føroyum.

**Samskiftisførleikar:** KST er eitt nattúrligt menningar-, samskiftis- og nýskapanaramboð. Vitan um KST-loysnir skal økja um nýtsluna av KST í øllum samfelagnum. Brúkarin skal kenna seg tryggan við at nýta KST, soleiðis at KST kemur út í hvønn krók í samfelagnum.

KST-gransking verður framd og ment soleiðis, at føroyska samfelagið hevur førleikar at taka ímóti, menna og miðla kunningartøkni á altjóða stigi, og samstundis hava fyrilit fyri menning av føroyskum vinnulívi.

| Frammarlaga raðfest øki | Dømi um undirevni |
|---|---|
| Matframleiðsla úr havinum | Marknaðarviðurskifti viðv. matvørum, biotøkni, matvørutrygd, framleiðslutøkni, útgerð og framleiðsluskipanir, djóraheilsa, vistskipanin á føroysku landleiðunum, umsiting og gagnnýtsla av tilfeinginum í sjónum, veðurlagsbroytingar, menning av nýggjum konsepti fyri flutning o.a. |
| Mentan | Mál, bókmentir, søga, mentanarsøga, list, námsfrøði, átrúnaður o.a. |
| Gentøkni | Arvaðar sjúkur hjá fólki, ílegukanningar innan fiskaaling o.a. |
| Samskiftisførleikar | Simultantulkingartøkni, telemedisin o.a. |

**Mynd 2**. Dømi upp á undirevni innan fyri raðfestu granskingarøkini.

# Fígging og úrtøka

**Tað almenna fíggjar upp til 2% av BTÚ. Vinnan og aðrir granskingargrunnar fíggja í minsta lagi 1% av BTÚ.**

## Soleiðis røkka vit málinum

Játtanin til gransking, menning og nýskipan verður stigvíst økt, so hon í 2015 er minst 3% av BTÚ. Langtíðarfíggjarætlanir (3-5 ár) verða gjørdar fyri almennu granskingarjáttanirnar. Sett verður í verk ein eftirmetingar- og dygdarskipan, sum skal tryggja, at sum mest fæst burturúr og at bert granskingarverkætlanir, ið lúka altjóða krøv, fáa stuðul.

Serlig tíðaravmarkað skattaskipan/afturberingarskipan verður sett í verk fyri útlendskar granskarar og serligir avskrivingarmøguleikar/afturberingarmøguleikar verða veittir fyritøkum í sambandi við vinnugransking. Føroyar skulu gerast partur av 7. rammuskrá hjá ES viðvíkjandi gransking, eins og karmarnir verða bøttir, so vit kunnu vera við í øðrum altjóða granskingarvirksemi. Granskingargrunnurin skal veita møguleikar fyri, at stuðul kann verða veittur sum partur av stuðli til altjóða granskingarsamstarv.

Almenna og vinnuliga fíggingin til gransking og menning (G&M) verður stigvíst økt, soleiðis at hon í 2015 í minsta lagi er 3% av BTÚ.

**Játtan í mió. kr. (í 2006 prísum):**

| Ár | Tað almenna | Vinnan og grunnar | Í alt |
|---|---|---|---|
| 2008 | 100 | 40 | 140 |
| 2009 | 125 | 45 | 170 |
| 2010 | 140 | 50 | 190 |
| 2011 | 150 | 60 | 210 |
| 2012 | 160 | 74 | 235 |
| 2013 | 180 | 90 | 270 |
| 2014 | 200 | 105 | 305 |
| 2015 | 225 | 120 | 345 |

**Talva 1**. Ætlað játtan til gransking og menning 2008 – 2015

Granskingarráðið hevur framt kanning av, hvussu nógv verður nýtt til gransking og menning í 2003. Á myndini niðanfyri sæst, at tilsamans vórðu 84,4 mió. kr. nýttar til G&M. Vinnan nýtti 20,6 mió. kr., meðan tað almenna nýtti 63,7 mió. kr. Samlaðu útreiðslur til G&M svara til 0,87% av BTÚ. Á myndini sæst eisini, hvussu prosentbýtið er millum vinnuna og tað almenna.




**Mynd 3**. Yvirlit yvir G&M í 2003

Sjálvt um tølini eru frá 2003, so er mest sannlíkt, at tann almenni parturin í dag er minkaður meðan tann privati er øktur nakað. Tí kann roknast við, at samlaðar útreiðslur til G&M í mun til BTÚ í 2006 eru lægri enn í 2003.

Tað er eisini viðkomandi, at staðfesta, hvaðani fíggingin til G&M stavar. Á myndini niðanfyri sæst, hvaðani fíggingin kemur.




**Mynd 4**. Fígging av G&M í Føroyum í 2003 (fíggingarkeldur)

## Skatta- og afturberingarskipan

### ”Kick start pakki” (2008 – 2012)

Mett verður, at Føroyar í dag eru á einum granskingarstigi, sum svarar til eitt vísital upp á 30 í mun til okkara grannalond, sum í miðal hava eitt vísital upp á 100. Skulu Føroyar verða ájavnt við okkara grannalond og koma framum í 2015, so skula fleiri og munadygg stig takast.

Fyri at fáa meira gongd á granskingina og fyri at taka tað innaftur, sum Føroyar eru aftan fyri tey lond, ið vit bera okkum saman við á hesum øki, er neyðugt, at serligar skipanir verða settar í verk. Skipanirnar verða settar í verk í eitt tíðaravmarkað skeið, t.d. frá 2008 og til og við 2012. Hetta er ein av týðandi fortreytunum fyri at tryggja granskingini skjóta og dygga byrjan. Nøkur av hesum átøkum eru at fáa útlendskar granskarar til Føroya, sum hava serliga góðar granskingarførleikar, so vit fáa ment eitt gott granskingarumhvørvi. Tað hepnast vanliga væl hjá slíkum granskingarumhvørvum at útvega týðandi uttanhýsis fígging, t.d. frá útlendskum granskingargrunnum. Tað er í slíkum granskingarumhvørvi, at tey bestu úrslitini verða skapað, bæði hvat grundgransking og nýtslugransking viðvíkur.

Tá ið ein slík tíðaravmarkað skipan verður sett í verk, er neyðugt, at hon hevur nøkur greið eyðkenni. Útlendsku granskararnir skulu t.d. hava eitt ávíst útbúgvingarstig (granskingarførleika) og skulu kunna prógva, at teir kunnu vinna minst kr. 350.000 um árið á viðkomandi arbeiðsøki. Eru hesar treytir loknar, so ber til at fáa tíðaravmarkaðar fíggjarligar fyrimunir. Hinvegin er neyðugt, at samfelagið hevur hóskandi bústaðarmøguleikar at bjóða, t.d. barnaansing og ein altjóða skúla. Vinnan eigur eisini sín part í, at málið um 3% av BTÚ verður nýtt til gransking, menning og nýskapan í 2015. Fyri at eggja vinnuni enn meira til at fremja sín part, so stendur henni í boði at taka lut í serligum vinnuligum ph.d.-verkætlanum. Við støði í teimum upphæddum, sum vinnan nýtir til gransking, menning og nýskapan, fær vinnan eisini møguleika fyri at tvífalda sínar avskrivingarútreiðslur í skattaroknskapinum, ella eina samsvarandi afturberingarskipan.

Dømi upp á “kick-start”-pakka:

1. Persónlig eyðkenni
   - Útbúgving
   - Trygd fyri árligari inntøku (>350 tús. kr.) á viðkomandi arbeiðsøki
2. Fíggjarligir fyrimunir
   - Serlig skatta- ella afturberingarskipan í 3 ár fyri útlendskar granskarar
   - Eftir 3 ára stigvísa tillaging í 3 ár til vanligu skattaskipanina
3. Sosial og mentanarlig tilboð
   - Bústaður
   - Barnaansing
   - Altjóða skúli

4. Vinnulig átøk
   - Serlig átøk fyri vinnugransking (vinnu-ph.d.)

- Serligar tíðaravmarkaðar avskrivingarmøguleikar ella afturberingarskipan fyri vinnugransking (1:2)

Føroyar gerast partur av 7. rammuskránni hjá ES viðvíkjandi gransking, eins og karmar verða bøttir, so vit kunnu vera við í øðrum altjóða granskingarvirksemi.

## Úrtøku- og dygdarskipan

Tryggjast skal, at fíggjarliga úrtøkan er so stór sum til ber, samstundis sum dygdin er í hásæti. Fyri at stuðla undir hetta verða hesi tiltøk sett í verk:

1. Allar almennar granskingarjáttanir verða lýstar á heimasíðuni hjá Granskingargrunninum
2. G&M-hagtøl verða framleidd og kunngjørd á øðrumhvørjum ári og 4. hvørt ár fyri nýskapan
3. OECD-eftirmeting av granskingini verður framd í 2009 og í 2014
4. Mál- og avriksstýring verður framd í 2011 í sambandi við allar granskingarjáttanir
5. Skipað máting og eftirmeting skal tryggja dygdina
    a. **Dygdarbarometur:** (t.d. ”peer-view” og altjóða viðurkendir ávísar (indikatorar), t.d. tal av endurgevingum og útgávuvirksemi)
    b. **Eftirmeting av størri skráum**: (størri granskingarskráir eiga at verða eftirmettar)
    c. **Granskingareftirmetingar:** (Skipað menning og savnan av royndum við hættum til granskingareftirmetingar)
    d. **Avýting:** (benchmarking) Hægri útbúgvingarnar skulu nýta innan- og uttanhýsis eftirmeting (avýting) sum lið í tí strategisku ráðleggingini og raðfestingini av universitetsgranskingini
6. Altjóða krøv skulu setast til granskingarverkætlanir og eigur størst møgulig kapping at vera millum almennu granskingarjáttanirnar.

Vísindalig úrslit skulu almannakunngerast í altjóða granskarasamfelagnum. Tað er eins umráðandi, at vísindaligu úrslitini verða miðlað í Føroyum, har tey skulu vera við til at skapa haldgott avgerðargrundarlag, bæði hjá løgtinginum, kommunum, vinnuni, feløgum og í samfelagnum annars.